LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fylgiskjal 2

Orðalisti við góðkendum revsirættarligum orðum (oktobur 2023)

Adgangskode:	Loyniorð	
Afpressing:	Avnoyðsla	
Almenfarlige forbrydelser:	Alvandasom brotsverk	
Angiveri:	Smettan	
Besidde:	Hava um hendi	
Bistandsadvokat:	Stuðulsadvokat	Advokatur, sum skal verða stuðul hjá órættaða
Bistandsværge:	Stuðulsverji	Bistandsværge verður tilnevndur av rættinum sambært § 71 í revsilógini. Ein stuðulsverji er ikki advokatur, men skal hjálpa tí ákærda í málinum. Um ákærdi verður dømdur til at verða settur á stovn ella í trygdarvarðhald, skal stuðulsverjin halda seg kunnigan við støðuna hjá tí dømda og ansa eftir, at upphaldið og aðrar fyriskipanir ikki vara longri enn neyðugt.
Bringe sig i beruset tilstand:	Av egnum ávum gerst rúsaður	
Citater:	Endurtøkur	

Gongin 7 • Box 64 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 80 80 • ✉ lmr@lmr.fo • www.lmr.fo

Erklæring:	Váttan	
Etnisk oprindelse:	Etniskur uppruni	
Fjernelse af organer:	Lívgagnatøka	
Flygte:	Flýggja	
Forklaring:	Frágreiðing	
Formuegode:	Ognarlutur	
Formuegoder:	Ognir	
Fornærmelige ord eller handlinger:	Niðrandi orð ella gerðir	
Forstikke:	Burturfjala	
Forsæt:	Tilætlan	
Forsæt – ringe styrke eller fasthed i det forbryderske forsæt:	Vantandi styrki ella treysti í brotsligu tilælanini	Orðing í § 21, stk. 2 í revsilógini
Forsætligt:	Tilætlað	
Forsøg:	Brotsroynd	
Fuldbyrdelse:	Fullgerð	
Gengivelser:	Endurgevingar	
Gerningsmand:	Gerningsmaður	
Grooming:	Lokking	
Handling:	Gerð	
Hindre:	Forða	
Hvervning til fremmed væbnet styrke:	Útvega fólk til fremmand herlið	Tá ið talan er um, nakað onnur gera
Hvervning til eller tjenestgøring i:	Innskriving til ella hertænasta fyri	Tá ið talan er um, nakað man sjálvur ger
Håndhæve:	Handhevja	

Hæleri:	Fæloynd	
Indretning:	Útbúnað	"tað sum ein er útgjørdur við" – reiðskapur, tól. Orðingin verður nýttur í samband við hjálp til sjúkum og særdum í kríggi.
Karakteren af:	Hvat ið sermerkir	
Kode:	Kota	"Kota" hevur ein breiðari týdning enn "loyniorð". Samanber við "adgangskode".
Kredit:	Kredittur	
Kriminalforsorg:	Brotsumsorgan	Navnið á hugtakið, ikki á stovninum
Krænkelse:	Mannminkan	
Landsforræderi:	Landasvik	
Legemsangreb:	Likamsálop	
Materiel:	Útgerð	"Útbúnaður á t.d. skipi, báti o.tíl., hentleikar, reiðskapur, amboð, tól" Nýtt í samband við hjálp til sjúkum og særdum í kríggi.
Medvirke:	Viðvirka	
Midler:	Fæ	
Midler, tilvejebringe eller indsamle:	Útvega ella savna inn figging ella onnur ráð	Brúkt í § 114 b, nr. 2 í revsilógin. Tað er einki beinleiðis føroyskt orð fyri "midler". Fígging er eitt ov smalt hugtak í hesum høpinum. Fyri at fáa tann víðari týdningin við er orðingin "ella onnur ráð" lagt afturat.
Offentlig tjeneste eller hverv:	Tænastu ella starv hjá tí almenna	
Ophæve:	Úrgildiseting (seta úr gildi)	

Opløb:	Ófriðarflokkur	Hetta er bert galdandi í revsirættarligum høpi. Opløb kann annars hava rættiliga ólíkar merkingar á donskum Hetta er annars brúkt í §§ 120, 133 og 134 í revsilógin.
Overhængende fare:	Hóttandi vandi	
Plyndring:	Púrga	Alt verður tikið frá tær. Føroyamálsdeildin hevur fleiri dømi um púrga í seðlasavninum, t.d. úr kortspæli og fiskivinnuni. § 180 í revsilógin.
Proformaretshandel:	Sýnisrættargerð	
Propagandavirksomhed:	Propagandavirksemi	
Retsgode:	Rættargóði	
Ruffer:	Ruffari	
Rufferi:	Ruffarí	
Råd eller dåd:	Við ráði ella verki	
Sabotage:	Sabotasja	
Samtykke baseret voldtægtsbestemmelse:	Samtykkigrundað neyðtøkuáseting	
Sextortion:	Kynslig avnoyðsla	
Sindssygdom:	Sinnissjúku	Rættspsykiatrisk avgerð – revsirættarligt hugtak
Stalking:	Tráfylging	
Straffuldbyrdelse:	Revsifulnaður	
Strakstilhold:	Bráfeingis frástøðuboð	
Større antal personer:	Fleiri fólk	
Tilhold:	Frástøðuboð	
Tillægsstraf:	Ískoytisrevsing	
Tilregnelig:	Saknæmur	

Tilskyndelse:	Tileggjan	Kann eisini verða tilstuðlan
Tjenestehandling:	Tænastugerð	
Tvangsanbragt:	Tvingsilssetur	
Uagtsomt:	Av ósketni	
Udbytte:	Vinning ella úrtøku	
Ulovlig omgang med hittegods:	Finningsbrot	
Unddrage brev:	Halda einum brævi aftur	
Den undvegne:	Tann rýmdi	
Undvige:	Sleppa til rýmingar	
Utilbørlig fornærmende:	Óhøviliga vanærandi	
Utilregnelig:	Ósaknæmur	
Vildfarelse:	Misfatan	
Vilkår:	Fylgistreytir	
Voldtægt	Neyðtøka	